Heilsumálaráðið

Heilsumálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn
tel 30 40 50
fax 35 40 45
hmr@hmr.fo
www.hmr.fo

# Tilmæli um koppseting fyri H1N1 beinkrím

**Koppingarevnið fyri H1N1 kom fyri stuttum til Føroyar, og farið er undir ókeypis at koppseta fólk, ið eru í serligum vanda fyri at gerast álvarsliga sjúk av Influensu A (H1N1). Fólk, ið eru í vandabólki, verða tilmæld at bíleggja tíð hjá egnum kommunulækna skjótast gjørligt.**

Vandabólkarnir eru eitt nú tey, ið hava niðursett lungnavirkni, astma, hjartasjúku, sukursjúku, niðursetta immunverju og fólk við høgari yvirvekt.

**Soleiðis verður farið fram**
Í løtuni verða tey í vandabólki, sum eru undir 65 ár, koppsett. Um stutta tíð verður farið undir at koppseta tey í vandabólki, sum eru 65 ár og eldri.

Fólk skulu sjálvi seta seg í samband við kommunulæknan og bíleggja tíð til koppsetingina. Koppað verður tvær ferðir. Kopping av fólki í vandabólki er ókeypis.

**Vandabólkar**
Í vandabólki eru persónar, sum eru eldri enn 6 mánaðir við hesum varandi sjúkum:
- Lungnasjúkur sum KOL, astma við varandi obstruktión og astma, sum er ring at stýra, cystisk fibrosa, sarkoidosa, lungnafibrosa umframt aðrar lungnasjúkur, serliga tá lungnavirknið er minkað, ella tað ofta eru lungnainfektiónir.
- Hjarta- og æðrasjúkur, serliga svár koronarsjúka, hjartasvignan, svárir hjartaklaffatrupulleikar.
- Blóðsjúkur, serliga hæmoglobinopatiir.
- Diabetes 1 og 2, serliga við truplum hjarta- og nýrasjúkum ella við viknan, orsakað av diabetiskum seinfylgjum – ella diabetes, sum er trupul at stýra.
- Minkað immunverja, sum er viðfødd ella íkomin, t.d. vegna hiv-smittu ella heilivágsviðgerð.
- Sjúka í nerva-vøddalagnum, ið ávirkar lungnavirknið ella minkar um megina at hosta.
- Varandi livur- og nýrasvignan (vegleiðandi GFR < 30 ml/min)
- Ovurfiti (vegleiðandi BMI > 40)
- Aðrar sjúkur, har støðan eftir meting frá læknanum viðførir, at influensasjúka hevur við sær álvarsligan heilsuvanda.
- Barnakonur, sum hava eina av teimum nevndu varandi sjúkum. Barnakonur áðrenn 13. viku, tó eftir meting hjá egnum lækna.

**Onnur:**
- Allar aðrar barnakonur frá 13. barnsburðarviku kunnu verða bjóðaðar kopping, um tær sjálvar ynskja tað.
- Húsfólk hjá sjúklingum við nógv niðursettari immunverju.

Meira kunning um vandabólkar og koppseting fyri H1N1 fæst á heimasíðuni hjá Heilsmumálaráðnum (www.hmr.fo), hjá danska Heilsustýrinum (www.sst.dk) og Statens Serum Institut (www.ssi.dk).

**Landslæknin og Heilsumálaráðið**

Starvslýsing

www.torshavn.fo

# Stjóri søkist

Starvið sum **trivnaðarstjóri**
er leyst at søkja.

Umsóknir skulu vera kommununi í hendi
í seinasta lagi 25. november 2009 kl. 12.

Les meira á www.torshavn.fo

**TÓRSHAVNAR KOMMUNA ER LANDSINS STØRSTA KOMMUNA.** Í kommununi starvast til samans 1400 fólk, harav 130 fólk í sjálvari umsitingini. Vit leggja sera stóran dent á fakliga menning og trivnað. Arbeiðsumhvørvið er fjølbroytt, og vit hava eina nútímans og opnan leiðsluhátt, har starvsfólkamenning er avgerandi. Vit hava ein virknan starvsfólkapolitikk og raðfesta innanhýsis samskiftið og samskiftið við borgaran høgt. Hetta fyri at tú og borgarin altíð skulu kenna tykkum væl í Tórshavnar kommunu. **Les meira um starvsfólkapolitikkin á www.torshavn.fo**

TÓRSHAVNAR KOMMUNA